# í Ráðhúsinum í Keypmannahavn



*George Hollanders úr Íslandi sýndi hondgjørdar leikur fram*



*hjá Nuka Godtfredsen*



*14 føroyskar kvinnur vóru millum framsýnararnar, á myndini royna tær at telja, hvat teirra kynsbýti er í mun til tað íslendska*



*Michael Kjøller Jacobeus starvaðist í nógv ár hjá býargartnaranum í Havn, úr trøðum úr plantaguni í Havn hevur hann telgt hesar sterku maskur*

glas, keramik, filtning, vatnlitsmyndir, klædnaprent, leður, maskir, linoleumsprent, ulllist og ymiskt annað, ið alt tænir, ið ætlanini um at menna innlitið hjá dønum í list úr Norður Atlantshavi.

## Væl nøgdur samskipari

Meðan vit smakkaðu okkum á tiltiknu Ráðhúspannukøkurnar, fingu vit orð á føroyska samskiparan Sigrun Gunnarsdóttir. Hon segði seg vera væl nøgda við framsýningina. At hanga list av 86 ymiskum listafólkum upp í sama høli er torført, og hon viðgekk, at tá hon hevði vitja risastóra og tóma Ráðhússalin í januar, hevði hon stúrt eitt sindur fyri, hvussu hetta fór at ganga. Men tað riggaði væl nú úrslitið var komið upp at hanga. Ole Kofoed er scenografur og hevur megnað at fáa framsýningina at hanga saman.

Sigrun Gunnarsdóttir sat í nevndini í felagnum hjá føroyskum myndlistafólki, tá Ole Kofoed setti seg í samband við tey, og hon gjørdist tí samskipari av føroyska partinum av tiltakinum. Felagið vísti Ole Kofoed á ymisk listafólk, bæði limir í felagnum og luttakarar í Gluggaglæmu. Kofoed valdi so luttakarnar. Tilsamans gjørdist talan um 14 føroyskar kvinnur og 6 menn. Sigrun heldur ikki, at tað ger nakað, at kvinnurnar eru í meiriluta á hesi framsýning, tí hetta kann eggja fleiri kvinnum til at royna seg.

## Grønlendarar vóru í minniluta

Einans fýra grønlendsk listafólk luttóku á framsýningini, og eingin grønlendskur samskipari var. Hetta hóast ætlanin allatíðina var, at grønlendarar skuldu vera við á jøvnum føti við hini londini. Men her var okkurt fari fram, ið ikki kom í ljósmála undir ferniseringini. Vit fingu orð á ein av teimum meira sermerktu framsýnarunum Nuka Godtfredsen. Hansara listarverk hingu á einum veggi eitt petti burturi, í sær sjálvum vóru tey naturalistiskir málningar, ið mest myntu um fotomyndir. Framman fyri myndirnar einar 7-8 metrar burturi stóð ein stólur og ein kikari. Tá tú hugdi at myndini gjøgnum kikaran, fekk hon eina heilt aðra dýpd og gjørdist næstan trýdimensionell.

Nuka greiddi frá, at hann var perfektionist og plagdi longu sum tannáringur at kanna myndir sínar við kikara, fyri at tryggja sær at allir smálutir vóru fullkomnir, soleiðis var hugskotið við kikaranum komi.

Framsýningin verður opin fyri almenninginum til 28. mars og gevur eitt frálíkt innlit í nógvar ymiskar síðir av føroyskari íslendskari og grønlendskari list.